tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 17.07.2024 kl. 15:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Eyð Jóna Eidesgaard

Varalimir: Jens Arni Leo Hammerfoss, til viðgerðina av mál 52/24

Ikki møtt: Eyð Eidesgaard var við í viðgerðini av mál 52/24

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 52/24 | 24/00181-2 | Umhvørvisstovan -Uppskot til góðkenning av árinskanning av virkseminum hjá P/F Varðin Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri |
| 53/24 | 24/00057-2 | Vegagerð -íbinda Heiðarveg við vøllin á Sevmýri |
| 54/24 | 23/00213-7 | Uppskot til kunngerð um burturkast ítil hoyringar - freist 30. august 2024 |
| 55/24 | 24/00184-1 | Reykjavík Culture Night 2024 -Mentarnarnátt í Reykjavík 24. aug. 2024 |
| 56/24 | 24/00165-2 | FSR -Umsókn um eyka stuðulsjáttan til bygging av nýggja neystinum á Hvítanesi |
| 57/24 | | |
| **Til kunningar** | | |
| 17/24 | 24/00052-2 | Hagtøl |
| 18/24 | 24/00004-1 | Skattatøl 2024 |
| | | |

Eyð Eidesgaard hevur fráboða, at hon metur seg verða ógegniga at viðgerða mál 52/24 *"Umhvørvisstovan -Uppskot til góðkenning av árinskanning av virkseminum hjá P/F Varðin Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri"* og hevur biði fyrst valda tiltakslimin á lista "C" Javnarflokkin, Jens Arna Leo Hammerfoss at møta til viðgerðina av hesum einstaka málinum.

Kristin Michelsen boðar frá, at Jens Arni Leo Hammerfoss hevur frammanundan havt sæti í býráðnum, og tekur sostatt sæti í býráðnum uttan atkvøðugreiðslu.

Kristin Michelsen lesur skránna og spyr um viðmerkingar. -ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

**<u>52/24</u>**
**<u>24/00181-2 Umhvørvisstovan -Uppskot til góðkenning av árinskanning av virkseminum hjá P/F Varðin Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri</u>**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.07.2024 | 39/24 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 11.07.2024 | 28/24 |
| 3 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 11.07.2024 | 27/24 |
| 4 Býráðið | 17.07.2024 | 52/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.06.2024**
Umsitingin hevur móttikið teldupost frá Umhvørvisstovuni, við hoyring -*av árinskanning*- til uppskot til góðkenning av virkseminum hjá P/F Varðin Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri sambært § 21 í havumhvørvislógin send tykkum til hoyringar.

Hoyringsfreistin er 4 vikur, til og við 19. Juli. Um viðmerkingar -*ella ongar viðmerkingar*- eru til uppskotið, verður kommunan biðin um at boða Umhvørvisstovuni frá hesum.

*Gerast skal vart við at virksemi eisini skal hava eina dagførda umhvørvisgóðkenning og verður uppskot til umhvørvisgóðkenning eisini sent tykkum til hoyringar í næstum.*

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Vinnu- og havnanevndini, Teknisku nevnd og Trivnar- og umhvørvisnevndini, samt býráðnum til ummælis og støðutakan.

**<u>Tekniska nevnd 08. juli 2024:</u>**
Eyð Eidesgaard var ikki við í viðgerðini av hesum málinum, og fór av fundinum.
Tekniska nevnd er kunnað um uppskotið til góðkenning av virkseminum hjá P/F Varðin Pelagic, og hevur viðgjørt tað. Ongar viðmerkingar eru til uppskotið.

**<u>Vinnu- og havnanevndin 11. juli 2024:</u>**
Vinnu- og havnanevndin er kunnað um uppskotið til góðkenning av virkseminum hjá P/F Varðin Pelagic, og hevur viðgjørt tað. Nevndin tekur undir við góðkenningini, og hevur onga viðmerking til málið.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 11. juli 2024:**
Trivnaðar- og umhvørvisnevndin er kunnað um uppskotið til góðkenning av virkseminum hjá P/F Varðin Pelagic, og hevur viðgjørt tað. Nevndin hevur onga viðmerking til góðkenningina, og tekur einmælt undir við góðkenningini hjá Umhvørvisstovuni.

**Býráðið 17. juli 2024:**
Eið Eidesgaard var ikki við til viðgerðina av málinum.
Býráðið samtykkir einmælt tilmælið hjá Teknisku nevnd 8. juli 2024, tilmælið hjá Vinnu &-havnanevndini 11. juli 2024 og Trivnaðar- & umhvørvisnevndin 11. juli 2024.

**53/24**
**24/00057-2 Vegagerð -íbinda Heiðarveg við vøllin á Sevmýri**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 19.02.2024 | 15/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 14/24 |
| 3 Býráðið | 29.02.2024 | 5/24 |
| 4 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 29/24 |
| 5 Býráðið | 27.06.2024 | 48/24 |
| 6 Tekniska nevnd | 08.07.2024 | 38/24 |
| 7 Býráðið | 17.07.2024 | 53/24 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 14.02.2024)**
Nú SEV hevur skund tørv, at grava nýggjan SEV háspennings kaðal úr grótbrotinum undir Akurgerði og vestur eftir vegnum undir Heygnum, vil hetta viðføra, at vegurin undir Heygnum verður stongdur í eitt longri tíðarskeið, og umstøðurnar hjá borgarum at ferðast millum Froðba og Tvøroyri vera skerdar munandi.

Fyri at lætta um hesa støðuna, verður mælt til, at vegurin, ið gongur vestur gjøgnum Heiðarnar, verður gjørdur farbarur og íbundin landsynningshornið á vøllin á Sevmýri. Haðani førast fram við vøllinum og íbindast Tjaldursveg/Sevmýri. Talan er um vegagerð, sum  er byrja fyri fleiri árum síðani, men enn ikki er gjørd liðug.

Talan er um uml. 250 metrar sum í resta, og hevur umsitingin fingið tilboð frá veitara, sum kann gera vegin farbaran fyri kr. 1.25 mió. *(hetta tó uttan asfaltering, gøtuljós og leiðingar)*. Hetta verður mett av teknisku deild, sum verandi lágur kostnaður, tá slíkt vegarbeiði vanl. Liggur hægri enn 10.tkr/m.

Onnur grundgeving fyri at liðugt gera vegin er, at hesin vil betra munandi um atkomuna millum Froðba og Tvøroyri, eins og bústaðarøki B1 liggur upp at vegnum.

Umsitingin mælir býráðnum til, at tekniska deild fær heimild at samráðast við teir 4 eigararnir av lendinum, sum farast skal ígjøgnum, og at tekniska deild, fær heimild til at  gjøgnumføra hesa vegagerð.

Umsitingin mælir til at fáa heimild til at:
1. Samráðast við eigarar av lendi, har vegurin verður lagdur, um at fremja ognarbýti eftir viðlagda kortskjal.
2. Ognartaka lendi til vegagerð samb. heimild í §12 í Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. Mars 2022.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. Mars 2022

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024 , ongin nágreina avseting er til hesa vegagerð, krevur tí eykajáttan. - Mælt verður til at fíggja verkætlanina av §625 bygging og løguframleiðsla.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið teknisku nevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Tekniska nevnd 19. februar 2024:**
Form. í teknisku nevnd mælir nevndini til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku deild, at samráðast við eigarar av lendi, har vegurin verður lagdur, um at fremja ognarabýti eftir viðlagda kortskjal. Og um mett neyðugt, at ognartaka lendi til vegagerð. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku nevnd. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá tekniskunevnd og fíggjarnevndini.

**Kommunustjórin 21.04.2024:**
Umsitingin hevur samskift við:

1. Niels Petersen eigara av matr.nr 18b, sum hevur undirskriva avtalu um gerðabýtið/marknað umskipan við Tvøroyrar kommunu, har hann fær tilsvarandi part aftur av matr. nr. 23c.
2. Brandur Magnusson Kristensen, ið er eigari av matr. nr. 14 b, hevur undirskriva avtalu um at lata part av matr. nr 14b til ætlaðu vegagerðina, har hann afturfyri fær ibindingarveg til síni sethús.
3. Eyðbjørn Larsen, sum umboðar eigarar av matr.nr 22c, «Jacobina Thorsteinsson og eft. av Jonna S. Larsen». Hesi eru ikki áhuga í gerðabýtið, men ynskja tó at latað tað jørð, sum tørvur er á til ætlaðu vegagerðina fyri kr. 98,- /fermeturin.
4. Mortan Thorman Vang, eigari av matr. nr. 16, hevur upplýst á fundi við umsitingina, at hann ynskir at lata part sunnara enda av matr. nr. 16 til ætlaðu vegagerð. Ongin avtala er gjørt um gerðabýti, men hugsandi kundi verði eitt javnbjóðis gjald fyri m2.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Borgarstjórin kunnar um fyriliggjandi avtalur við eigarar, og mælir til, at heita á tekniskudeild um at projektera vegin samsvarandi fyriliggjandi avtalur og ætlan um vegaføring. Einmælt samtykt.

**Býráðið 27. juni 2024:**
Einmælt samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 08. juli 2024:**
Tekniska nevnd tekur einmælt undir við ætlanini at íbinda Heiðaveg við gamla fótbóltsvøllin á Sevmýri sambært avtalu við avvarðandi eigarar og fyriliggjandi uppskoti frá MTV-byggivirkið, móttikið við telduposti dagfestur 26. juni 2024. Málið verður hervið beint í býráðið.

**Býráðið 17. juli 2024:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð at fremja ætlanina samb. tilmælið hjá teknisku nevnd 8. Juli 2024, og verkætlanin verður játta av §625 “Bygging og løguframleiðsla”

# 54/24
# 23/00213-7 Uppskot til kunngerð um burturkast ítil hoyringar - freist 30. august 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 11.07.2024 | 28/24 |
| 2 Býráðið | 17.07.2024 | 54/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 09.07.2024**

Dagførda uppskotið til burturkastkunngerð verður við hesum sent tykkum til møguligar viðmerkingar. Fyrra uppskotið varð sent kommununum til viðmerkingar 6. mai 2022.

Umhvørvismálaráðið greiðir niðanfyri frá høvuðstættunum í uppskotinum. Afturat hesum – og í mun til fyrra uppskotið – kunnu kommunurnar millum annað leggja til merkis:

a. Heimildin at krevja gjald er víðkað nakað (§2, stk. 3-4)
b. Ásetingin um akfør, sum hava tænt fyri seg, er broytt (§ 3, stk. 3). Áður varð hetta umrøtt sum bilvrak v.m.
c. Boð um at lata burturkast til innsavningarskipan verða givin eigara av matrikli (§ 4).
d. Meiri er gjørt burturút allýsingunum (§ 6)
e. Krøvini til kommunalu burturkastætlanina eru nágreinað og broytt (§ 9 og § 11)
f. Krøvini til kortleggingin av burturkaststøðuni eru herd (§ 10)
g. Kommunustýrið skal á hvørjum ári gera serstaka fíggjarætlan og serstakan ársroknskap fyri burturkastøkið (§ 12, stk. 3).
h. Talið av burturkastbólkum til húsarhaldsburturkast er økt úr 6 upp í 10 (§ 14)
i. Talið av burturkastbólkum til húsarhaldsburturkast í avhendingarskipanini er økt úr 6 upp í 17 (§ 15)
j. Talið av burturkastbólkum til vinnuburturkast í avhendingarskipanini er økt úr 12 upp í 20 (§ 16)
k. Formkrøvini til vinnu/stovnar v.m. eru broytt (§§ 17-8
l. Reglurnar koma í gildi so líðandi. Landsætlanin hjá US fyri fyribyrging og handfaring av burturkasti skal gerast pr. 1. januar 2025. Síðani verða summar ásetingar settar í gildi frá 1. januar 2026 og frá 1. januar 2030 koma síðstu ásetingarnar í gildi (§ 27).

Viðmerkingar frá kommununum skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi **mánadagin 19. august 2024 kl. 12**.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Trivnar- & umhvørvisnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 11. juli 2024:**
Nevndin er ónøgd við, at tað verða løgd herd krøv á kommununa, uttan at hædd verður tikin fyri, um kommunan kann økja um burturkastmóttøkuna. Hesar broytingarnar fara at hækka munandi um útreiðslurnar hjá Tvøroyrar kommunu. Um hesar kunngerðirnar verða settar í gildi, heldur nevndin, at fígging eigur at fylgja við frá landinum. IRF er í gongd við at gera nýggja, felags móttøkustøð í Trøllavík fyri alla oynna. Nevndin mælir tískil til, at hendan kunngerðin ikki verður sett í verk, fyrrenn móttøkustøðin er liðug og klár til at taka ímóti burturkasti.

**Býráðið 17. juli 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað og tekur býráðið einmælt undir við tilmælinum hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndin, 11. juli 2024.

**55/24**

**24/00184-1 Reykjavík Culture Night 2024 -Mentarnarnátt í Reykjavík 24. aug. 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 26.06.2024 | 41/24 |
| 2 Mentanarnevndin | 17.07.2024 | 45/24 |
| 3 Býráðið | 17.07.2024 | 55/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 26.06.2024**
Form. í mentanarnevndini ynskir at viðgerða hvørt Mentanarnevndin á Tvøroyri vitjar mentanrnáttina í Íslandi 24. aug. 2024.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ongin ávís játtan er avsett á FÆ2024.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanar nevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 26. juni 2024:**
Einmælt samtykt, at umsitingin leggur ferðina tilrættis og harundir kannar kostnað av ferðini.

**Kommunustjórin 15.07.2024:**
Umsitingin hevur fingið kostnaðarmeting frá ferðaskrivstovu á kr/pr. per. 6.025,-  ex. flutning KEF/REY/KEF og tænastugjøld.

**Mentanarnevndin 17. juli 2024:**
Nevndin mælir til at form. í mentanarnevndini saman við 1-2 fólkum í umsitingini vitja Reykjavík Culture Night 2024 fyri at fáa íblástur til mentanartiltøk á Tvøroyri. Form. mælir til at vitjanin verður játta av §522, stuðul til mentan. Einmælt samtykt, málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 17. juli 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini 17. Juli 2024.

**56/24**
**24/00165-2 FSR -Umsókn um eyka stuðulsjáttan til bygging av nýggja neystinum á Hvítanesi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.06.2024 | 41/24 |
| 2 Býráðið | 27.06.2024 | 45/24 |
| 3 Býráðið | 17.07.2024 | 56/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 18.06.2024**
Umsitingin hevur hin 18.06.2024 móttikið skriv frá FSR, ið søkir Tvøroyrar kommunu um at veita eyka stuðulsjáttan á kr. 1,55 mió til bygging av nýggjum kapppróðrarneysti á Hvítanesi.

Tvøroyrar býráð samtykti einmælt hin 28. oktober 2021 stuðulsavtaluna millum TVK og FSR. Tá bleiv upplýst, at samlaði kostnaðurin av nýggja neystinum bleiv kr. 10,32 mió ex. mvg. Tvøroyrar býráð samtykti at veita kr. 6,5 mió. ex. mvg í stuðul, meðan Lokale og Anlægsfonden stuðlaði við kr. 3.8 mió.

TVK hevur eftir fylgjandi flutt/samtykt í stuðul til nýtt neyst d.d. **kr. 7,1 mió**

| *Dagf.* | *kr. mió.* |
|---|---|
| *27.12.2020* | *3,5* |
| *26.11.2021* | *1,5* |
| *01.12.2023* | *1,0* |
| *01.05.2024* | *1,1* |
| ***18.06.2024 íalt*** | ***7,1*** |

FSR skriva í umsóknini dagf. 16 juni 2024:

> *Byggingin av nýggja felagshúsinum hjá Froðbiar Sóknar Róðrarfelag er nú so væl áleiðis, at sjálvur bygningurin er liðugur uttan. Innanarbeiði eru ígongd har veggir eru lidnir og klárt er til installatiónir.*
>
> *El-arbeiðið er ígongd, og er annars klárt at seta alla endaligu liðuggerðina ígongd.*
> *Verkætlanin hevur verið ígongd í rúma tíð. Størri prísjavning á tilfari og arbeiði hevur verið í hesum tíðarskeiðinum og hevur hetta eisini ávirkað hesa verkætlan.*
>
> *Lokale og Anlægsfonden hevur játtað at vera partur av meirveitingini, við teirra parti, sum er 37% upp til 1.607.0000,-*
>
> *Fundir hava verið leypandi í bygginenvndini um gongdina í verkætlanini og á seinasta fundi var ein enda fíggjarætlan løgd fram, fyri at gera verkætlanina lidna innan næstu 2-3 mánaðarnar. Fleiri tilboð eru nú innkomin og sáttmálar gjørdir, og er seinasta dagføringing gjørd av fíggjarætlanini.*
>
> *Við hesum fer Froðbiar Sóknar Róðrarfelag at søkja Tvøroyrar kommunu um kr.: 1.550.000,00*
>
> *Við róðrarkvøðu, Froðbiar Sóknar Róðrarfelag*

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** TVK hevur avsett á FÆ2024, kr. 1,1 mió, sum fíggjarligur stuðul til bygging av neysti hjá FSR, ið eru fluttar FSR 01.05.2024.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 27. juni 2024:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt at lata FSR, Froðbiar Sóknar Róðrarfelag stuðul á kr. 1.1 mió, til bygging av nýggjum neysti á Hvítanesi, ið er avsett á §525, FÆ2024.

Fíggjarnevndin samtykkir einmælt, at lata FSR, Froðbiar Sóknar Róðrarfelag eyka stuðulsjáttan upp til kr. 1,55 mió til bygging av nýggjum kapplóðrarneysti á Hvítanesi, vísandi til umsókn frá FSR dagf. 18.06.2024. Fíggjarnevndin mælir til, at eyka stuðulsjáttanin verður veitt FSR við eykajáttan av innistandandi, og útgoldin á deponeringskonto eftir at góðkendur ársroknskapur hjá FSR ár 2023 verður latin Tvøroyrar kommunu, har í eisini roknskapur pr. 31. mai 2024 fyri byggiverkætlanina av nýggja neystinum á Hvítanesi. -málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 27. juni 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**Býráðið 17. juli 2024:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð at veita FSR eyka stuðulsjáttan upp til kr. 1,55 mió til bygging av nýggjum kapplóðrarneysti á Hvítanesi, vísandi til umsókn frá FSR dagf. 18.06.2024.

**57/24**
**24/00198-1 Lukka mál**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 17.07.2024 | 57/24 |

**Býráðið 17. juli 2024:**

**Til kunningar**

## 17/24
## 24/00052-2 Hagtøl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | | |
| 2 Býráðið | 17.07.2024 | 17/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15. Juli 2024**

Fólkatal:
Hagtsovan 10. Juli 2024

> *Knapt 54.700 fólk búðu í Føroyum 1. juni — vøksturin er 0,6%*
> *Fólkatalið vaks við 323 persónum seinasta árið, og 1. juni búðu 54.687 fólk í Føroyum. Tað svarar til ein vøkstur á 0,6%, sum er minni enn í undanfarna tíðarskeiði, tá hann var 0,9%.*
>
> *Fólkatalið seinasta árið vaks mest í Tórshavnar, Klaksvíkar, Nes, Runavíkar og Eysturkommunu. Sum nakað nýtt er Skopunar kommuna á sætta plássi. Har vaks fólkatalið við 22 persónum ella 4,7 prosentum. Fólkatalið minkaði mest í Eiðis, Vágs og Vestmanna kommunu.*

Samb. fólkayvirlitinum 15. Juli 2024, fólkatalið í kommunum og bygdum í Suðuroynni:

| Kommuna | Juli-2024 | Juli 2023 | Munur | Viðm. |
|---|---|---|---|---|
| Fámjin | 74 | 80 | -6 | 1 føtt og 1 deyður |
| Hov | 106 | 104 | +2 | 1 føtt og eingin deyður |
| Hvalba | 632 | 651 | -19 | 3 fødd og 11 deyð |
| Porkeri | 325 | 323 | +2 | 5 fødd og 3 deyð |
| Sumba | 334 | 331 | +3 | 4 fødd og 1 deyður |
| Tvøroyri | 1758 | 1759 | -1 | 15 fødd og 14 deyð |
| Vágur | 1341 | 1373 | -32 | 9 fødd og 10 deyð |

Samanlagt eru vit 4570 fólk í oynni í dag, í mun til 4621 fólk fyri einum ári síðan, tað er ein munur upp á 51 fólk skeiva vegin. 38 børn eru fødd í oynni, seinasta árið og 40 fólk eru deyð, tað er eitt negativt burðartal upp á 2.

**Býráðið 17. juli 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**18/24**
**24/00004-1 Skattatøl 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 2/24 |
| 2 Býráðið | 29.02.2024 | 4/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 5/24 |
| 4 Býráðið | 25.03.2024 | 9/24 |
| 5 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 8/24 |
| 6 Býráðið | 06.05.2024 | 13/24 |
| 7 Fíggjarnevndin | 06.06.2024 | 9/24 |
| 8 Býráðið | 06.06.2024 | 14/24 |
| 9 Býráðið | 17.07.2024 | 18/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2024**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2023/2024

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024/2025

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 06. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 17. juli 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

Fundurin lokin kl. 15:55

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Jens Arni Hammerfoss Leo

Eyð Jóna Eidesgaard